# VINNU SÍÐURNAR

Nr. 249 • mikudagur • 29. desember 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Stapin og Fiskivarði á Toftum

**Týsdagin landaðu línuskipini, Stapin og Fiskivarði, á Toftum. Bæði skipini komu inn fyri jól**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Línuskipini, Stapin av Toftum og Fiskivarði úr Oyndarfirði, landaðu bæði á Toftum týsdagin.

Á Fiskamarknaði Føroya siga tey, at Stapin seldi hýsuna gjøgnum P/F Snodd, har skipið eisini landaði, meðan Fiskamarknaðurin seldi tey 24.000 pundini av øðrum fiski, sum skipið hevði inni.

Meginparturin av veiðini hjá Stapanum var hýsa, men á Fiskamarknaðinum vistu tey ikki at siga, hvussu nógva hýsu skipið hevði.

Eini 9.000 pund av veiðini hjá Stapanum var toskur, sum fór fyri 16,41 krónur í miðal fyri kilo. Restin av veiðini var eitt nú longa, brosma, havtaska og kalvi.

Stapin kom inn fyri jól.

## Fiskivarði

Fiskivarði hevði eini 30.000 pund hendan seinasta túrin fyri jól. Meginparturin av veiðini var hýsa, sum skipið seldi beinleiðis til virkið, Valhalla á Toftum.

Á Fiskamarknaði Føroya vistu tey ikki at siga, hvussu nógv Fiskivarði fekk fyri hýsuna.

Fiskivarði kom eisini inn fyri jól.




*Helst fara nakrir dagar at ganga, áðrenn verulig gongd kemur á aftur landingarnar og soleiðis eisini fiskaframleiðsluna á landi*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*





# STJÓRI

## Hevur tú hug at leiða Timburhandilin inn í framtíðina?

**Sum stjóri** fært tú latið upp í hendur saman við verandi stjóra at menna og leiða fyritøkuna. Tú fært ábyrgd og leiðsluna av dagliga rakstrinum hjá Timburhandlinum, og við málsøkni og planlegging skal tú tryggja, at fyritøkan við nøktandi úrsliti røkkur málum, sum tú verður við til at seta.

**Uppgávur tínar** fevna um leiðslu, planlegging og menning av øllum rakstrarøkjum, ið hava beinleiðis samband við vanliga raksturin hjá Timburhandlinum. Tú skalt umboða fyritøkuna úteftir, samstundis sum tú skal virka fyri, at drívmegi er í fyritøkuni at røkka tínum málum.

**Vit vænta** at tú ert álítandi fólk, sum hevur evni at leiða eitt virkið arbeiðspláss, at tú hevur áræði og skapanarevni, ið mugu til fyri at reka eina fyritøku í eini vinnugrein, Ið er merkt av sera harðari kapping.
Vit vænta, at tú hevur evni at brynja fyritøkuna til tær avbjóðingar, ið liggja fyri framman. Tað skal fella tær náttúrligt at arbeiða sjálvstøðugt og at skipa arbeiðsviðurskifti hjá øðrum

**Tínar kvalifikatiónir** skulu byggja á hægri útbúgving innan øki, Ið mugu metast at stuðla tær í starvi sum leiðandi starvsfólk. Royndir innan vinnulív ella leiðslu i profittskapandi felag ella felagsskapi e.l. eru viðkomandi og avgerandi.

**Frá okkum** fært tú boðið eitt spennandi og vællønt starv, har tú innan tryggar karmar veruliga fær møguleika at royna tíni evni. Í samstarv við verandi stjóra og nevnd felagsins verður tað tú, ið skalt fyriskipa flestu viðurskifti í fyritøkuni.

**Freistin** at søkja starvið er **20 januar. 2005**. Miðað verður eftir at seta starvið í seinasta lagi tann 1. apríl 2005.

Umsókn saman við viðkomandi skjølum skal sendast til:
**Timburhandilin**
**Heykavegur 4**
**Box 3038**
**100 Tórshavn**
**Att: Heini Fosaa, stjóra**

Timburhandilin varð stovnaður í 1928. Fyritøkan er í dag ein framkomin fyritøka av sínum slag sum rekur handlarnar Timburhandilin á Hálsi í Havn, 2x3 og Timburhandilin á Kambsdali, sum samanlagt hava eitt søluøki á slakar 8000 m2 innandura. Fyritøkan er saman við P/F Vest Pack partur av H.T. Holding-samtakinum, sum hevur ein árligan umsetning uppá góðar 110 mió kr. Samanlagt starvast 75 fólk í samtakinum.

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN

**Heykavegur 4 • Postsmoga 3038 • 110 Tórshavn** • Tel 31 12 50 • Fax 31 54 60 • ht@ht-tilfar.fo
**www.timburhandilin.fo**